# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

## Minningarorð um mammu mína Josefinu Højgaard á Toftum



Mikudagin 22. november hevði mamma, Josefina Højgaard á Toftum, fylt 74 ár. Hendan føðingardagin kom hon ikki at uppliva. Mamma doyði 21. september í ár, og hóast hon tey seinastu árini hevði nógv brek at dragast við, so kom deyðin sum ein rættiligur hvøkkur fyri meg og alla familjuna.

Mamma var úr Brekkum á Toftum. Foreldur hennara vóru Dagmar og Pidde Højgaard, sum bæði eisini vóru av Toftum. Mamma var elst av fýra systkjum og einasta genta. Sum ung fór hon í handilin hjá abba sínum D.P. Højgaard at arbeiða, men eitt ár var hon í Danmark og arbeiddi á einum røktarheimi, men kom aftur í handilin hjá langabba at arbeiða, har hon var, til hon giftist pápa, Eskild, sum eisini er av Toftum. Saman fingu tey fimm børn.

Mamma var sera áhugað í øllum lívsins viðurskiftum. Hon fylgdi væl við í hvat fyrifórst í samfelagnum. Henni dámdi væl at lesa og ikki at tala um krossorðagáturnar, sum hon hevði sum dagdvølju.

Mamma dugdi væl at gera mat, og fáir føðingadagar eru farnir burturúr her suðuri, har hon ikki er komin suður og hevur tikið hond í við fyrireikingunum. Væl dámdi henni eisini at savna familjuna í heiminum á Toftum, ongantíð vóru vit ov nógv eftir hennara tykki, og væl tók hon í móti versyni, verdøtrum, ommubørnum og langommusyni. Hon var líka við øll, og altíð hugsaði hon meiri um onnur enn seg sjálva.

Mamma var eisini stuttligt, hon dugdi væl at taka til og fortelja. Hon hevði góða sangrødd og sum yngri sang hon í kórinum hjá Hans Jacob Højgaard. Tað var ein stór uppliving fyri hana, tá ið tey eftirlivandi av kórinum møttust aftur til eina minningarkonsert í kirkjuni á Toftum.

Kirkjuna var mamma góð við og vitjaði trúgv, og sum presturin segði í gravartalu síni, møtti hon eisini altíð til tær konsertir, sum vórðu hildnar har.

Tann seinasta tíðin hjá mammu var strævin. Vit hildu øll, at tá ið hon hevði vunnið á ringu sjúku síni í fjør, fór hon at uppliva nøkur góð ár afturat, men so skuldi ikki verða. Hon datt, og fekk boð um at sita í koyristóli í tríggjar mánaðir, men sum altíð tá ið tað kom til sjúku hjá mammu, so sá hon ljóst upp á alt og væntaði, at aftan á tveir mánaðir, fór hon aftur at ganga. Tað gjørdi hon tó ikki her, men heima í himmalinum.

Eg tosaði í telefon við hana um morgunin, sum hon doyði seinnapartin. Lagið var sera gott, hon helt, at nú gekk alt framá, og eg gleddist við henni. Tí komu deyðsboðini sama dagin sera dáttliga við. Tað uggar meg tó at vita, at hon í dag er sloppin undan allari pínu og hevur tað gott, har hon er.

Við hesum fáu orðum vil eg lýsa frið yvir minninum av mammu míni, Josefinu Højgaard.

**Herdis**

## Royndi entrepenørurin Petur Jacobsen farin

**28. mai 1956 – 14. november 2006**



Seinasta týsdag bórust boðini bráðliga, at Petur Jacobsen var deyður – fimmti ára gamal. Hann doyði av arbeiðsvanlukku á Argjum í gravimaskinu, ið fáur so væl sum hann dugdi at føra

Petur var sonur Kristian Jacobsen og Turid, fødd Kjærbo, seinni broytt til Gunnrim. Hann var úr Havn og hon úr Sumba.

Trý vóru tey systkini: Elstur var Petur og so koma Kristina og Sólfríð. Børnini vuksu upp við Oyggjarvegin í Havn.

Øll, ið kendu Petur vistu, at tað at arbeiða lá til hansara. Sum Bergur Debes Joensen, prestur segði yvir børuni í Havnar Kirkju leygardagin, so var tað ikki tað skrivliga og bókliga arbeiðið, men at fáast við bilar og maskinur.

Hann fekk roynt seg í ymsum arbeiðum tey fyrstu árini: Var boðdrongur á Telegrafstøðini eina tíð, í timburlæru eitt ár, á bilverkstaðnum hjá Wenzel eitt skifti, til hann fór at koyra vørubil hjá Frants Restorff. Har var hann eini tvey ár – og har møtti hann eisini Sæmundu.

Tað eru nú okkurt um 30 ár síðan, at tað rann saman teirra millum. Tey fingu sjey børn: Sámal Kristian, Turid, Sunnleif, Petur, Súsanna, Magnus og Sigrið. Sámal er 29 ár og Sigrið er fýra, so har eru 25 ár ímillum elsta og yngsta. Abba- og ommubørnini eru tvey: Sissal og Brandur. Í konuni Sæmundu hevði Petur góðan og trúgvan stuðul. Hon hevur arbeitt heima øll árini. Seinastu 20 árini hava tey búð í Djúpagili í Hoyvík.

Eftir tíðina hjá Frants Restorff fór Petur undir egið virksemi. Hann byrjaði egna vørukoyring, til hann fór undir entrepenørarbeiði. Hann keypti gravmaskinur, lastbilar, og onkuntíð hevði hann fleiri fólk í arbeiði. Í entrepenørarbeiðnum vóru útstykkingar í Suðurstreymi og aðrastaðni um landið. Hann gróv, hann sprongdi, hann legði rør, hann planeraði.

Men ikki bara arbeiði hugsaði Petur um. Familjan hevði eisini stóran týdning fyri hann. Sjey vóru nú børnini, so har var nógv at síggja til. Í Hvalvík hevði Petur keypt eini fitt, gomul hús. Har var hann nú so ofta, hann kundi. Hann umvældi og gjørdi um, og hann hevði ætlanir. Hann hevði stórar ætlanir í Hvalvík, har hann fall til alt meiri og meiri. Har norðuri kundi hann slappa av, men har hevði hann ætlanir um at fara undir eina størri verkætlan. Hetta var ein ætlan, hann var sera spentur uppá, tí hon sá so lovandi út. Eisini fyri framtíðina hjá familjuni.

Men mongum brestur ætlan. Undir arbeiði á Argjum kemur Petur út fyri einum skaða, sum kostaði honum bráðliga lívið. Mitt í øllum var hann rivin burtur. Fyri familju og vinir ein ræðulig og sjokkerandi hending. Ein royndur entrepenørur var bráddliga farin.

Tað er so mangt, sum kundi verið sagt um Petur. Í kirkjuni bar prestur fram nøkur eyðkenni, ið fólk nikkandi kundu taka undur við lýsa væl mannin:

»Hann var sera hjálpsamur persónur«.

»Góður at heita á. Og gjørdi ikki alt upp í pengum. Heldur øvugt«.

»Alt ov góður av sær«.

»Ein góður og hjálpsamur vinur!«

Friður verið við minninum um Petur Jacobsen.



*Her síggja vit Petur saman við abbasoninum, Brandi. Myndin er tikin, tá Petur í september gróv út hjá soninum Sámal Kristiani, sum byggir á Velbastað*

Sosialurin

Lesið Sosialin - so eru tit við